# Minningarorð um Karl Jespersen langabba

## Føddur 7/10-1915 – deyður 20/3-2010



Eftir eitt langt og mangan strævið, men eisini eydnuríkt lív, andaðist Karl Jespersen 94 ára gamal.

Fyri einans 3 árum síðan átti eg eisini ein langabba og eina langommu við Gjógv. Øll blivu tey yvir 90 ára gomul .

Gigomman á Tvøroyri og langomman og langabbin í Hvalba blivu øll 79 ára gomul. Nú eru mong ár síðan tey doyðu. Eg minnist ikki so nógv til teirra, men tey vóru eisini góð við meg.

Tá ið føðingardagar vóru, var Karlabbin við. Hann hevði altíð ein brævbjálva við pengum í við sær, og inni í brævbjálvanum var eisini altíð ein yrking.

Tá ið eg fór út á Tvøroyri at ganga í skúla, var eg mangan og vitjaði Karlabban. Hevði eg ein frítíma, var leiðin løgd oman í krambúðina. Tá eg hevði prátað eina løtu við Jonhard abban í krambúðini, plagdi eg at fara upp til Langabban. Tað var so hugnaligt at ganga upp í gjøgnum tær smølu trappurnar og síðani at gloppa hurðina. Hvørja ferð sá eg tað sama: Har sat Karlabbin í ruggistólinum framman fyri sjónvarpinum, og í hondini hevði hann snúshornið, sum hann hevði fingið úr Íslandi. Tá ið hann sá meg, rætti hann báðar armarnar yvir høvd, og sum oftast rópti hann: "Hey sjøman, kom innar!" Eg setti meg altíð við vindeygað yvir av honum. Altíð stóðu ein ella fleiri skálir við bommum á borðinum. So byrjaði hann at siga frá øllum tí, ið honum hevði verið fyri. Hann kundi steðga á eina løtu, meðan hann fekk sær snús í nøsina, so helt hann fram, oftast var tað frá útróðrinum í Grønlandi, ið hann greiddi frá.

Karlabbin og langabbin við Gjógv vóru so líkir á manga hátt, teir vóru lættir av lyndi, altíð í góðum lag, lættir og kvikir á fótum, komst tú at vitja, sótu teir altíð og skemtaðu sær við børnini. Báðir blivu teir 94 ára gamlir, men tað, sum teir høvdu mest til felags, var, at teimum dámdi sera væl at vera á sjónum og at fáast við fisk.

Karlabbin var so óheppin at bróta sær mjødnina, hann kom ikki úr songini aftur. Hann lá á Suðuroyar Sjúkrahúsi teir seinastu dagarnar, men hann hevði tað lætta sinnalagið, til hann legði eyguni saman.

Nú gerandisdagurin er byrjaður aftur, er tað ikki tað sama at koma inn í krambúðina, ongi fet, onki prát er at hoyra úr stovuni uppiá, so tað er saknur ikki at kunna fara uppá at vitja Karlabban. Men eg havi mong góð minnir eftir Karlabban.

**Jónhard Ferjá**

# Føðingar



*4. apríl fingu Beinta Ejdesgaard Bech og Anthon Borgardal, Lopra, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4330 gr.*

3. apríl fingu Jonni Vinther og Dánjal Johan Joensen, Sumba, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3480 gr.

13. apríl fingu Judith Falkvard og Høgni Joensen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 4200 gr.

13. apríl fingu Kristvør og Eivind Kolden, Skopun, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3450 gr.

15. apríl fekk Jákup Martin ein lítlan beiggja. Hann var 57 cm langur og vigaði 4750 gr. Foreldur teirra eru Birita og Henning Jarnskor, Syðrugøtu.

17. apríl fingu Katrina Maria og Brynleif Vang, Glyvrum, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3610 gr.

19. apríl fingu Fríða Berg og Bárður Dal Christiansen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon vigaði 3770 gr og var 50 cm long.

19. apríl fingu Marita og Jógvan Vilhelm, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3300 gr.

19. apríl fingu Beinta og Jan Laursen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3100 gr.

21. apríl fingu Randi Simonsen og Høgni á Lofti, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4270 gr.

21. apríl fingu Majbritt og Djóni Strømsten, Sandavági, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3315 gr.

21. apríl fingu Marja Lund Gjógvará og Brian Sjúrðarson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4090 gr.

**70 ára føðingardagur**

Leygardagin 24. apríl verður Solveig Nolsøe Johansen 70 ár. Opið hús verður leygardagin 24. apríl í Jómsborg frá kl. 14 til kl 18. Øll eru vælkomin.

## TØKK

Hjartans tøkk fyri sýnda umsorgan og samkenslu, tá ið okkara høgt elskaði maður, pápi, sonur og beiggi

**Malmberg Heri Simonsen**

doyði og varð jarðaður.

Takk til familju, vinir og kenningar. Takk til tykkum mongu, sum tóku ímóti okkum á flogvøllinum, tá vit komu heim.

Takk til Ingu Poulsen Dam fyri troystarrík orð í kirkjuni, og takk til kirkjutænarar, organist og sangarar. Somuleiðis takk til Bjartu og Terja fyri góðan sang í kirkjuni.

Takk til øll, ið á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.

Takk til starvsfólkið á Hotel Tórshavn og á Ríkissjúkrahúsinum fyri stuðul og umsorgan í hesi sváru tíð.

Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað. Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til Krabbameinsfelagið.

***Familjunnar vegna***

**Dora, Pauli, Mikkjal, Sára og Egon**

## TØKK

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Thorbjørn Lisberg**
**Trongisvági**

andaðist og varð jarðaður, takka vit hjartaliga.

Tøkk til prest fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og kirkjuni. Tøkk til organist, kirkjutænarar og sangarar.

Og til tykkum, sum hjálptu okkum við ervinum.

***Familjunnar vegna***

**Jens og Marner**

## TØKK

Hjartans takk fyri sýnda samkenslu, tá ið

**Hans Marius**

lá sjúkur, og tá ið hann fór til gravar.

Ein serlig takk til starvsfólkið á G1 og G4 á Landssjúkrahúsinum.

***Bergljót og genturnar v/familju***
***Vitus og Turið v/familju***

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi tá okkara kæra mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma

**Elsa Margretha Frederiksen**

Við Kirkjar, Miðvági
andaðist og varð jarðað.

Vit takka sambýlinum í Vestmanna og Ellis- og røktarheiminum á Sýnuni fyri røkt og umsorgan, tíðina hon var har.

Tøkk til David Johannesen, prest fyri góð og troystarrík orð. Tøkk til Elsu Margit fyri minnisvekjandi orð í kirkjuni.

Tøkk til kirkjutænarar, organist og sangarar.

Eisini takka vit fyri peningagávur til búfólkið á Sýnuni, blómur og kransar.

***Familjunnar vegna***

**John, Jóan Pauli, Anny, Árni og Regin**